HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Til Løgtingið
Stílað til: Rættarnevnd Løgtingsins

Dagf.: 6. novembur 2025
Mál: 25/29698-4

Viðv. LM-011/2025: Uppskot til løgtingslóg um sterilisatión og kastratión (Sterilisatiónslógin)

Fyrispurningur er komin frá Rættarnevnd Løgtingsin til uppskot til løgtingslóg um sterilisatión og kastratión (Sterilisatiónslógin) § 19.

> *§ 19. Sterilisatión og kastratión kann bara verða framd av serlæknum í kvinnusjúkum, obstetrik og urologi.*

Spurningurin er soljóðandi:
Um lækni undir útbúgving skurðviðger einsamallur ella undir supervisión av serlækna?

Viðmerking frá Rættarnevndini:
Á hoyringarfundinum í Rættarnevndini, 3. november 2025, upplýsti Ann Danielsen, serlækni í kvinnusjúkum, at læknar undir útbúgving eisini skurðviðgera fyri sterilisatión.

Svar:
Í serlæknaútbúgvingini fremja útbúgvingarlæknar skurðviðgerðir saman við einum serlækna í byrjanini av síni útbúgving. Tá mett verður, at útbúgvingarlæknin er førur fyri at gera skurðviðgerðir sjálvstøðugt, ger hann tað í samráð við serlæknan, sum er tøkur til vegleiðing.

Útbúgvingarlæknar arbeiða altíð undir delegatión og supervisión, tá ið teir gera serlæknaarbeiði.

Vinarliga

Heilsumálaráðið

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • www.hmr.fo • hmr@hmr.fo